Útbjóðing

# Reingerð á Farstøðini

Við hesum verður reingerðin av Farstøðini hjá Strandfaraskipum Landsins, Eystara Bryggja, boðin út.

**Uppgávurnar fevna um**
Á Farstøðini er talan um 2 hæddir og hølir sum skrivstovur, toilettir, gangir, onnur smáhølir og trappuuppgongd. Nærri avtala verður gjørd um uppgávur og treytir, herundir arbeiðstíðir.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at umsøkjarar lúka fylgjandi høvuðskrøv:
- Hava viðkomandi royndir
- Eru álítandi

**Tilboð**
Tilboð, ið eru gjørd út frá avtalu um uppgávurnar, skulu stílast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. mai 2002

Áhugað verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Regin Vágadal, ferðslusamskipara, tlf. 34 30 00 ella e-post: rev@ssl.fo fyri at fáa nærri at vita um uppgávurnar.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum/ -Samskiftisdeildini.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

UNITED seafood

# Skrivstovufólk

Við hesum verður søkt eftir skrivstovufólki til Føroya Fiskavirking, Runavík, at byrja skjótast gjørligt.

**Krav er at umsøkjari hevur:**
- Skrivstovuútbúgving

**Fyrimun hevur umsøkjari, ið eisini hevur:**
- Góðan førleika í bókhaldi
- Kunnleika til teldunýtslu

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Elisabeth Djurhuus, tlf. 447054.

Umsóknin skal sendast áðrenn 14. mai 2002 til:

**UNITED SEAFOOD**
**P/F Føroya Fiskavirking Runavík**
att.: Elisabeth Djurhuus
Bryggjan
FO–600 Runavík

*Føroya Fiskavirking er eitt felag, sum í dag eigur 7 fiskavirkir.*

*Vit keypa fisk frá føroyskum skipum og bátum – at virka á okkara virkjum. Eisini keypa vit bæði feskan- og frystan fisk frá útlendskum skipum til virkingar.*

*Á virkjum okkara framleiða vit í dag:*
- *Frystar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa og USA*
- *Frystar vørur til matvøruídnaðin í Evropa og USA*
- *Feskar vørur beinleiðis til brúkarar í Evropa*
- *Feskar vørur til matvøruídnaðin í Evropa*
- *Saltfisk til brúkarar í Evropa*

*Fyri at tryggja góðskustøðið og matvørutrygdina eru á øllum virkjum okkara egnar góðskudeildir, sum framhaldandi kanna vøruna. Øll virkir okkara arbeiða eftir HACCP skipanini. Søludeild okkara er marknaðarrættað við høgum støði av serkunnleika viðvíkjandi vørukunnleika, -logistikki og - marknaði.*

*Krøv kundans verða sett í hásæti, eins og nøgdirnar av feskum-, frystum- og saltaðum fiskavørum, vit framleiða og selja, gera, at kundar okkara bæði í Evropa og USA meta, at teir altíð kunna fáa tørv sín nøktaðan best møguligt hjá okkum. Fiskasløgini, sum vit fyrst og fremst arbeiða, eru: Upsi, toskur, hýsa, svartkalvi og kongafiskur.*



DELL™ Dimension 4400



**Intel 1.8 Ghz Pentium 4**
**256MB DDR-RAM PC266**
**40GB Harddisk 7200 RPM¤**
**16X DVD**
**64MB Geforce2 v//TV-Out**
**SoundBlaster Live ljÛ¤kort**
**19" Dell Skermur**
**H/K H·talara vi¤ Subwoofer**
**MS. WorkSuite 2001¤**
**Windows XP Home**
**3 ·ra fullur garantiur**

**v/ Epson C40UX Litprentara**

**16.700,-**

FARODANE City
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR
SMYRILSVEGUR 7 - FO-100 T RSHAVN - TEL: 31 14 14

# Plenuklipparar o.a. til urtagarðsrøkt



**Opið er leygardagin frá kl. 9-14**
**Ger kvetti - Vit hava sera góð TILBOÐ**

**Pf. THOMAS DAM Á HÁLSI**
**Heykavegur 3 - Tlf. 311400**

THOMAS DAM
**Pf. THOMAS DAM**
**amboð & maskinur**
Jónas Broncksgøta 25 • Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Eysturskúlan at arbeiða fulla tíð.

Í Eysturskúlanum eru 610 næmingar og har starvast 50 lærarar.

**Arbeiðið umfatar**
vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. juni 2002. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið frá Eyðdis Eidesgaard, skúlastjóra, tlf. 31 47 52 ella Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 21. mai 2002. Viðmerk á umsóknina "skrivstovufólk".

SNARSKIVAN

# J & K BETONG

Søkt verður eftir raskum manni at arbeiða á blandistøðini.

Arbeiðið verður bæði á blandistøðini og koyring við betong.

Stóra koyrikortið krevst

J&K
**Tlf. 315060/215005**
**e-mail: JKP@JKP.FO**

# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/ Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

## Felagið Føroysk Tónaskøld

Aðalfundur verður í Pætursastovu leygardagin, tann 18. mei 2002 kl. 13.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Felagið Føroysk Tónaskøld**

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi 35/40 tímar um vikuna frá 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu. Starvið er fyribils í eitt ár, møguliga fast eftir hetta.
Søkir ongin pedagogur verður hjálparfólk sett.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3–7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran, tlf. 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 24/5-2002.

Barnagarðurin á Konmansmýru

Brúktur Toyota Landcruiser




Toyota Landcruiser
Árg. 11/94 km. 162.000 litur metal bláur
útgjald kr. 35.000,- / 175.000,-
kann umskrásetast til persónbil í nov. 2002

Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

# Býarplanur

Kunngjørt verður, at býarplanurin fyri tíðarskeiðið 2001 – 2010 er settur í gildi fyri Sunda kommunu við góðkenning Landsstýrisins frá 26. mars 2001 og 12. apríl 2002.

Býarplanurin er til skjals á kommunuskrivstovuni.

SUNDA KOMMUNA
**Sunda Kommunu**
460 Norðskála

# Skrivstovufólk

Fyri eitt av starvsfólkum okkara, sum fer í barsilsorlov, verður søkt eftir avloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum frá 1. juni og árið út.

Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði í samband við uppboðssøluna. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

## Summarferiuavloysari

Eisini søknast vit eftir feriuavloysara til høvuðsskrivstovuna á Toftum.
Arbeiðið fevnir um alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir innan skrivstovuyrkið.

Hevur tú hug at vita meira um størvini, ert tú vælkomin at ringja á telefon 414141.

Umsókn skal sendast til

Fiskamarknaður Føroya
**P/F Fiskamarknaður Føroya**
**650 Toftir**

og má vera okkum í hendi innan 10. mai 2002.

# Veltistudningur

Við heimild í fíggjarløgtingslóg fyri 2002, kto. 6.33.2.10 og vísandi til kunngerð nr. 106 frá 17. juni 1996 verður studningur veittur til nývelting, bøumvæling og vegagerð í nývelturn lendi.

Umsóknir um studning skulu verða ráðnum í hendi áðrenn 20. mei 2002.

Fyri at fáa studning, **skal**
- bóndin vera meirvirðisgjaldsskrásettur
- bóndin vera bókhaldsskyldigur
- **arbeiðsætlanin vera góðkend frammanundan**
- kort yvir tað lendið, sum søkt verður studning fyri, fylgja við umsóknini.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til skrivstovu ráðsins, tlf. 311180.

FØROYA JARÐARRÁÐ
Postrúm 50 • R. C. Effersøesgøta 4 • FO-110 Tórshavn
tlf. 311180 • fax 311185 • teldupostur: fj@fj.fo

# Hús í Klaksvík til sølu

Um hóskandi boð fæst eru hús okkara til sølu.

Meira fæst at vita á **tlf. 456376.**